# Føroyingar og íslendingar semjast um markið

**Mikudagin varð fyribils avtala undirskrivað millum Føroyar og Ísland um markið millum londini. Útgangsstøðið fyri avtaluni er miðlinjan.**

MARKNASEMJA
*Jan Müller*




*Kortið vísir nýggju marknaavtaluna millum Føroyar og Ísland*

25. september 2002 fer at vera eins minniligur dagur í føroyskari marknasøgu sum ávikavist 22. desember í 1992 og 18. mai í 1999. Felagsnevnarin fyri hesar dagar er, at Føroyar tá undirskrivaðu týdningarmiklar avtalur við onnur lond um rættin til ráevnini í undirgrundini, fiskatilfeingi í havinum og til mark.

Í gjár skrivaðu Anfinn Kallsberg, løgmaður og íslendski uttanríkisráðharrin Halldór Ásgrímsson, undir avtalu um marknaáseting á havleiðunum kring Ísland og Føroyar.

Hetta hevur verið eitt óloyst mál síðani londini fluttu markið út á 200 fjórðingar. Avtalan er soljóðandi:

a. Markið á havleiðunum millum Føroyar og Ísland, har stytri enn 400 fjórðingar eru millum grundlinjur teirra, skal byggja á miðlinjuregluna, við teimum tillagingum og serligu ásetingum, ið lýstar eru niðanfyri.
b. Núverandi øki, har krøvini um løgdømi á havinum umskarast, millum miðlinjunar, ið ásettar eru frá báðum síðum, hereftir umrøtt sum »Økið«, mett at vera umleið 3.650 ferkilometrar til víddar, skal býtast soleiðis: Markið skal verða ásett soleiðis, at tað býtir sunnara partin av Økinum, sunnanfyri 63Ë 30' N, »Undirøki A«, javnt (50/50), og norðara partin av Økinum, norðanfyri 63Ë 30' N, »Undirøki B«, í lutfallinum 60 % til Íslands og 40 % til Føroya.
c. Hóast hetta, skal fylgjandi galda í Undirøki A viðvíkjandi fiskiløgdømi:

1. Føroysk og íslendsk før hava rætt at fiska í øllum Undirøki A undir teimum reglum og forskriftum, sum galda fyri tey í teirra egnu fiskiløgdømum. Tey skulu bert verða undir eftirliti og handhevjan frá egnum myndugleikum.
2. Somuleiðis kunnu fiskirannsóknir verða gjørdar frá báðum síðum í øllum Undirøki A.

Omanfyristandandi loysn er úrslit av felags royndum frá báðum síðum at røkka semju, sum endurspeglar teirra góða granna- og vinalag. Henda Váttaða Fundarfrásøgn skal vera grundarlag undir einum formligum sáttmála, ið verður gjørdur samsvarandi við teirra innanhýsis stjórnarskipanarmannagongdir, millum Ríkisstjórn Danmarkar og Landsstýri Føroya øðrumegin og Ríkisstjórn Íslands hinumegin, um marknaseting á havleiðunum millum Føroya og Íslands.

3. Inntil formligur sáttmáli kemur í gildi, er frásøgnin frá samráðingum í Reykjavík. 24. og 25. november 1988 galdandi í Økinum stendur í váttaðu fundarfrásøgnini frá fundinum í Havn í gjár millum teir báðar stjórnarleiðararnar.

Á tíðindafundi í Tinganesi í gjár segði íslendski uttanríkisráðharrin seg vera sera væl nøgdan við avtaluna, sum ger, at Ísland nú hevur øll síni mørk innan fyri 200 fjórðingar uppá pláss. Hóast hetta hevur tikið 28 ár so helt hann, at báðir partar høvdu fingið eina góða avtalu. Hann var eisini fegin um, at tað ikki hava verið stórar ósemjur í hesum økinum, meðan málið hevur verið óloyst. Hann metti avtaluna sum dømi um at grannalond hava virðing fyri hvørjum øðrum. Tað er eitt gott tekin um framtíðar viðurskiftini millum londini. Eisini Anfinn Kallsberg løgmaður fegnaðist um avtaluna og helt eisini avtaluna verða eitt gott fyridømi fyri framtíðar samstarvi millum Ísland og Føroyar.

Við nýggju avtaluni eru greiðar reglur fyri fiskiskapi í umrødda øki og heldur løgmaður, at Føroyar hava fingið væl burtur úr. Hann vísir á, at hóast Føroyar í parti av økinum fáa 40% og íslendingar 60%, so gagnar avtalan føroyskari fiskivinnu sum heild. Bæði føroysk vinna og Uttanlandsnevndin taka undir við avtaluni sigur løgmaður.

Annars gera bæði føroyingar og íslendingar krav upp stórar partar av økinum sunnan fyri Føroyar, tvs. Hatton og Rockalløkið. Íslendski uttanríkisráðharrin sigur, at avtalan millum Føroyar og Ísland kann gagna víðari gongdini í tí málinum, har tað nú skulu gerast nógvar kanningar av jarðfrøðini. Eisini Írland og Bretland gera krav uppá hesi stóru økini, tí hildið verður at olja er í undirgrundini.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður og íslendski uttanríkisráðharrin Halldór Ásgrímsson undirskriva fyribils avtalu um markið millum londini. Avtalan verður av tekniskum orsøkum endaliga undirskrivað næsta ár.*

# Ongar ætlanir um at flyta Hotel Tórshavn í nýggj høli

**Landsstýrið hevur leigað hølini, sum hotellið er í, til, 2020 og tað kann verða dýrt at at siga sáttmálan upp, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum**

HOTEL TÓRSHAVN
*Áki Bertholdsen*

Tað eru ongar ætlanir um at finna nýggj høli til Hotel Tórshavn, sum er føroyska sjúklingahotellið í Keypmannahavn.

Hetta sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum í einum svari til Johan Dahl, løgtingsmann.

Løgtingsmaðurin hevur sett landsstýrismanninum nakrar skrivligar fyrispurningar um Hotel Tórshavn og á tingfundi seinnapartin í gjár, skuldi spurningarnir svarast.

Eitt nú spyr løgtingsmaðurin, hvat ítøkiligt verður gjørt fyri at tryggja, at støðan, sum kom í viðvíkjandi legionerbakteriuni í vatnskipanini á hotellinum, ikki endurtekur seg og um royndir verða tiknar av vatninum og, hvussu ofta.

Bill Justinussen sigur, at ein orsøk til, at Embætislæknanum fyri Keypmannahavnar og Frederiksbergs kommunur og Københavns Energi hava sagt, at orsøkin til at mongdin av legionellabakterium var so stór á Hotel Tórshavn, var, at hitin á tí heita vatninum var ov lágur. Málingar vístu, at hitin í heitvatnstangunum vóru ávikavist 35, 52 og 58stig,

Sambært Embætislæknanum nøraste legionellabakteriur best í hita, sum liggur í millum 25 og 40 stig. Ein onnur orsøk sambært embætislæknanum kann vera, at vatnið verður ov lítið útskift í rørunum til køksvaskini á kømrunum.

Síðani eru stig tikin til at loysa trupulleikan og hann er nú loystur og felagði, sum eigur húsið, hevur góðtikið kravið frá hotellinum um, at hitin ikki aftur verður settur so langt niður, at vandi fyri legionella tekur seg upp aftur

Hereftir skal vatnið eisini kannast reguliga.

Johan Dahl vildi eisini hava at vita, hvat verður gjørt við svampatrupulleikan á hotellinum?

Bill Justinussen svarar, at tað, sum higartil er gjørt, er at lappað hevur verið upp á trupulleikan. Svampurin er vaskaður burtur, og svampadrepandi evni er smurt á, har svampur hevur verið.

Hann ásannar tó, at hetta er ikki nøkur varandi loysn, tí fuktur er framvegis í vegginum, sum ger, at svampurin kemur aftur. Trivnaðarmálaráðið hevur tí havt fund við felagið, sum eigur húsið og givið teimum freist til 23. september ár at koma við eini støðufrágreiðing og eini ætlan fyri, hvussu teir ætla at loysa trupulleikan við svampinum.

Somuleiðis vil Johan Dahl hava at vita, um nøkur ætlan er um at bøta um umstøðurnar, sosialu støðuna og itrivsmøguleikarnar hjá teimum, sum eru har leingi.

– Ætlanin er, at framyvir skulu tey, sum eru leingi á hotellinum, hava tvey rúm at vera í, eitt rúm at sova í og eitt at vera í . Hetta eru tvey kømur við hurð ímillum.

*framhald á síðu 28*



UTTAN ÚR HEIMI

# Blair sannførdi ikki bretar

**Flestu bretsku bløðini eru á einum máli um, at tað eydnaðist ikki Tony Blair, forsætisráðharra at sannføra bretar um, at tað er neyðugt at leypa á Irak**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*



*Tað eydnaðist ikki Tony Blair, forsætisráðharra at sannføra bretar um, at tað er rætt at leypa á Irak. Undir orðaskiftinum sást eisini týðiliga, at fleiri av floksfeløgum forsætisráðharrans eru ímóti álopsætlanini*

*Mynd: Reuters*

Týsdagin royndi Tony Blair at sannføra bretsku politikararnar og bretska fólkið um, at Irak hevur hópoyðingarvápn, og at landsins forseti, Saddam Hussein, er til reiðar at nýta tey. Blair royndi eisini at sannføra bretar um, at tað er neyðugt við einum hernaðarátaki ímóti Irak. Grundarlagið undir røðuni hjá forsætisráðharranum var ein frágreiðing um hóttanina úr Irak.

Men bretsku bløðini eru ikki sannførd.

Financial Times skrivar, at ongar sannførandi grundgevingar vóru í frágreiðingini, sum rættvísgera eitt álop á Irak. Blaðið heldur, at í besta fall kann ST nýta frágreiðingina sum grundgeving fyri at herða tiltøkini ímóti stjórnini í Bagdad.

The Independent ivast ikki í, at irakar eru førir fyri at gera hópoyðingarvápn, men blaðið sigur seg ikki hava fingið eina einastu ábending um, at Irak ætlar at nýta hesi vápnini ímóti Vesturheiminum ella hansara sameindu.

- Uttan slíkar ábendingar ella slík prógv er einki grundarlag fyri einum hernaðarligum átaki ímóti Irak, og hetta var veikleikin í frágreiðingini hjá Blair, skrivar The Independent.

Daily Mirror heldur, at fleiri tiltøk kunnu setast í verk og eiga at verða roynd, áðrenn bretar og aðrir fara at tosa um bumbuálop og at senda hermenn til Irak.

Tað konservativa Daily Mail heldur harafturímóti, at frágreiðingin hjá forsætisráðharranum var sannførandi, men blaðið heldur, at forsætisráðharrin átti at lagt størri dent á innanríkispolitikkin. Eitt annað av teimum konservativu bløðunum, Daily Telegraph, vísir á, at frágreiðingin hjá Blair snúði seg meiri um avvápnað enn um yvirgang. Blaðið heldur tað vera løgið, at menn gera so nógv burtur úr Irak og vísir á, at tann spenta støðan millum India og Pakistan er ein nógv størri hóttan.

Einasta blaðið, sum beinleiðis tekur undir við Blair, er tað høgravenda Sun. Blaðið sigur seg taka undir við Bush og Blair og álopsætlan teirra og heldur, at tað kann taka alt ov drúgva tíð at bíða eftir, at ST og altjóða samfelagið taka støðu í Irak-málinum.

# Kinesarar taka beinini undan norskum fiskavirkjum

**Kinesarar keypa fisk úr Noregi, hagreiða hann og senda hann aftur á evropeiska marknaðin**

FISKIVINNU-TRUPULLEIKAR
*Árni Joensen*

Tað lága lønarlagið í Kina er vorðið ein álvarssom hóttan fyri norsku flakavirkini.

Seinastu árini hava kinesarar keypt heilfrystan tosk úr Noregi til virkingar, og í ár hevur hesin handil rættiliga vundið upp á seg. Síðani á nýggjárinum hava kinesarar keypt fimm ferðir so nógvan frystan tosk úr Noregi sum í sama tíðarskeiði í fjør.

Kinesarar skera fiskin og senda síðani flakið á evropeiska marknaðin, og hesin handil er nú vorðin ein verulig hóttan fyri norsku flakavinnuna. Orsøkin er tann lága lønin í Kina, sum ger, at eitt kilo av kinesiskum flaki er umleið fimm krónur bíligari enn eitt kilo av norskum flaki, hóast talan er um sama fisk.

Hesin stóri prísmunurin ger, at norska flakið hevur ongan møguleika at kappast við tað kinesiska, og hetta hevur havt við sær, at higartil í ár eru 20 norsk flakavirkir farin á húsagang.

Hildið verður, at skulu norsku virkini gera sær vónir um at standa seg í kappingini, noyðast tey at leggja seg eftir betri góðsku.

# Deyðarevsing stríðir ímóti amerikansku grundlógini

**Tað heldur í hvussu er ein amerikanskur dómari**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen*

Hetta er aðru ferð í ár, at ein amerikanskur dómari er komin til ta niðurstøðu, at deyðarevsing stríðir ímóti landsins grundlóg.

William Sessions, sum er dómari í statinum Vermont, segði í einum úrskurði týsdagin, at lógin frá 1994 um deyðarevsing er ikki í samsvari við amerikansku grundlógina, tí lógin tekur ávís grundlógartryggjaði rættindi frá teimum, sum verða ákærd fyri morð.

Úrskurðurin hjá William Sessions, dómara fær onga ávirkan á mannagongdina í teimum statunum í USA, sum loyva deyðarevsing, men úrskurðurin verður kortini mettur sum ein sigur hjá teimum felagsskapunum í USA, sum stríðast fyri at fáa deyðarevsing setta úr gildi.

## Eingin samgonga enn

Enn er einki komið burtur úr samráðingunum um at skipa samgongu aftan á svenska valið.

Sosialdemokratarnir og Vinstriflokkurin eru samdir um at halda fram, men teimum báðum tørvar stuðul frá Umhvørvisflokkinum fyri at hava meiriluta í ríkisdegnum. Í seinasta valskeiði stuðlaði Umhvørvisflokkurin stjórnina, men enn hevur hann ikki gjørt av, um hann er sinnaður at halda fram við tí.

Leiðslan í Umhvørvisflokkinum hevur kortini gjørt greitt, at hon vil heldur stuðla eina sosialdemokratiska stjórn enn eina borgarliga, men flokkurin vil hava sess í stjórnini fyri á tann hátt at fáa størri ávirkan á politikkin. Hesum kravi hevur Gøran Persson, forsætisráðharri víst frá aftur, og eygleiðarar í Stockholm halda ikki, at hann kann broyta støðu í hesum máli.

## Nógvar uppsagnir

Skipasmiðjurnar hjá norska ríkmanninum Kjell Inge Røkke hava so lítið at gera, at vandi er fyri, at fleiri hundrað fólk verða koyrd til hús í næstum.

Á Rosenberg-skipasmiðjuni í Stavanger hava 40 fólk fingið sekkin, men fakfeløgini vænta, at talið fer at koma upp á umleið 300, tá av tornar. Á einari aðrari skipasmiðju, Kværner Egersund, verða 200 fólk væntandi uppsøgd um ársskiftið, men talið kann lættliga koma upp á 400. Á Aker Stord er støðan tann sama. Har vænta tey, at umleið 250 noyðast til hús.

Blaðið Dagens Næringsliv skrivar, at skipasmiðjurnar eru í ógvuliga harðari kapping, og kemur einki munagott burtur úr, verða ætlandi umleið 1.000 fólk á skipasmiðjunum hjá Kjell Inge Røkke koyrd til hús teir næstu mánaðarnar.

## Funnu hópgrøv

Fólk hjá felagsskapinum Memorial hava funnið eina ovurstóra hópgrøv nakað eystan fyri St. Pætursborg í Russlandi. Talan er um eina hópgrøv frá Stalin-tíðini í tríatiárunum, og hildið verður, at umleið 30.000 lík eru í grøvini.

Ein talsmaður hjá Memorial sigur, at hópgrøvin er býtt sundur í umleið 50 smærri gravir, og at fleiri hundrað lík eru í hvørjari. Higartil hava teir tikið umleið 20 lík upp úr einari grøv. Tað visti seg, at fólkini vóru deyð av nakkaskoti.

Síðani Sovjetsamveldið datt sundur í 1991, hava Memorial og aðrir felagsskapir avdúkað fleiri hópgravir ymsastaðni í Russlandi, men eingin teirra hevur verið so stór sum tann eystan fyri St. Pætursborg. Higartil hava russisku myndugleikarnir hava ikki víst avdúkingunum stórvegis ans.

## Lovar skattalætta

Danski arbeiðaramálaráðharrin, Claus Hjort Frederiksen, ið verður hildin at vera næsti ráðgevi hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, sigur nú, at danir kunnu vænta sær skattalætta í 2004.

Higartil hava donsku ráðharrarnir og serliga teir hjá Vinstra verið ógvuliga varnir, tá tosað hevur verið um skattalætta, og forsætisráðharrin hevur ferð eftir ferð endurtikið, at talan verður ikki um at lækka skattin, fyrr enn ríkiskassin hevur ráð til tess.

Claus Hjort Frederiksen segði týsdagin, at stjórnin fer at gera tað, sum gerast kann, fyri at seta skattin niður, og hann legði afturat, at við verandi útlitum lækkar persónsskatturin 1. januar í 2004.